

www.oljan.fo

**Jan Müller** 26 - 10 - 2012

# Oljulandið Saudiarabia leggur um til sólorku

Í Saudiarabia hava myndugleikarnir ætlanir um, at í framtíðini skal øll orkunýtslan koma frá varandi orkukeldum. Tað hevur prinsurin Turki Al Faisal Al Saud, sum er ein av teimum fremstu talsmonnunum hjá kongshúsinum, váttað. Sum skilst skal sólorka fáa ein týðandi lut í saudiarabisku orkuveitingini í framtíðini, og harumframt hevur landið júst skrivað undir ein sáttmála við Argentina um gransking og menning innan kjarnorku. Sambært CNBC stava 62 prosent av orkuframleiðlsuni í Saudiarabia frá olju, og hitt kemur frá gassi. Heldur til framleiðslu -Fyri okkum hevur oljan størri virði undir jørðini enn sum brennievni. Kunnu vit røkka tí máli, at vit kunnu brúka aðra orku ístaðin fyri oljuna og so heldur brúka hana til at framleiða aðrar nyttuvørur burturúr, so verður tað til gagns fyri okkum og fyri umheimin. Tað er mín vón, at vit røkka hesum málinum í mínari tíð, men hesum ivist eg kortini í, sigur Turki Al Faisal Al Saud prinsur sambært CNBC. Eftir tí, sum CNBC hevur fingið at vita, ætla saudiartabar at brúka sína risastóru oljugoymslu til at framleiða aðrar vørur so sum plastrikk og polymir heldur enn at brúka hana sum brennievni á orkuverkum. Sambært altjóða orkustovninum IEA ræður Saudiarabia yvir 20 prosentum av allari olju í heiminum, og meiri enn 95 prosent av landsins útflutningsvirði stavar frá oljuni. ?

